UTTAN ÚR HEIMI





*Ongantíð áður hava so nógvir amerikanarar skrásett seg sum veljarar sum hesaferð, og tað verður avgerandi fyri, hvørt tað verður George W. Bush ella John Kerry, sum vinnur valið í dag*

*Mynd: Reuter's*

# Valluttøkan avgerandi fyri úrslitið

**Bæði George W. Bush og John Kerry hava eggjað veljarunum til at fara at atkvøða, og líkt er til, at valluttøkan hesaferð verður metstór. Júst tí torir eingin at siga, hvør fer at vinna**

VAL Í USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

George W. Bush og John Kerry hava gjørt alt fyri at fáa amerikanararnar at fara í valhølið í dag at greiða atkvøðu. Ongantíð áður hava teir báðir flokkarnir brúkt so nógv fólk at reka fólk á val, og fyribils bendir alt á, at tað hevur rikist væl. Ongantíð áður hava so nógv fólk skrásett seg sum veljarar, og ongantíð áður hava so nógv fólk verið og atkvøtt undan sjálvum valdegnum sum hesaferð.

Tað seinasta yvirlitið vísir, at meiri enn 143 milliónir amerikanarar eru skrásettir sum veljarar til hetta forsetavalið, og tað eru 20 milliónir fleiri enn til valið fyri fýra árum síðani. Vanliga verður sagt, at stór valluttøka kemur demokratunum til góðar, men hesaferð torir eingin at siga, at hetta eisini er galdandi í dag.

Valevnini bæði hava í hvussu er gjørt sítt til at reka fólk á val. Sunnudagin vóru bæði Bush og Kerry í Florida og Ohio, har stórur spenningur er um úrslitið, og harafturat gjørdi Kerry eitt rend til New Hampshire. Eisini í øðrum statum bleiv ein seinasta roynd gjørd at fáa fólk á val, men har vóru tað varaforsetaevnini, døtur hjá valevnunum, rockstjørnur og filmsleikarar, sum eggjaðu fólki til at velja.

## Milliónir reka

Bush og Kerry og teirra næstu medarbeiðarar hava verið á sjónvarpsskíggjanum um allan heim seinastu tíðina, men samstundis arbeiðir ein herur av fólki aftan fyri tjaldið.

Tey, sum skipa fyri valstríðnum hjá Bush og Dick Cheney, vilja vera við, at tey hava 1,4 millión fólk, sum sjálvboðin ganga hús úr húsi ella ganga úti á gøtunum og biðja fólk velja forsetan og varaforsetan fýra ár afturat. Í Kerry-legguni verður sagt, at hjá teimum ganga fleiri hundraðtúsund somu ørindi, samstundis sum ein hópur av ymsum áhugafelagskapum og fakfeløgum hava sent limir sínar út á gøtur og stræti at biðja fólk velja Kerry og John Edwards.

Einki verður spart. Teir seinastu dagarnar hava stuðlarnir hjá báðum flokkum ferðast landið runt við bussum, tokum og flogførum, tí hvør einasta atkvøða kann fáa týdning.

## Gølan í 2000 ávirkar

Gølan í Florida fyri fýra árum síðani, har fleiri túsund atkvøður ongantíð vórðu taldar við, hevur fingið nógvar veljarar at greiða atkvøðu longu undan sjálvum valdegnum, tí tá er størri vissa fyri, at atkvøðurnar koma við í ta endaligu uppteljingina.

Hetta hevur serliga gjørt seg galdandi í Florida. Har kundu tey fyrstu atkvøða tann 18. oktober, og hvønn einasta dag síðani hava fólk staðið í røð fyri at sleppa at atkvøða. Sambært valmyndugleikunum hava meiri enn tvær millónir fólk í Florida longu atkvøtt, og tað er hálva triðju ferðir fleiri enn í 2000, tá 537 atkvøður har avgjørdu valið.

Í Texas, heimstatinum hjá Bush, hava meiri enn 2,4 milliónir fólk longu verið og valt, og tað er 60 prosent fleiri enn fyri fýra árum síðani, sjálvt um tað langt síðani er greitt, hvør vinnur valið í Texas.

Teir seinastu dagarnar hava bíðirøðir verið uttan fyri valhøli um alt USA. Tað kemst ikki minst av, at báðir flokkarnir hava eggjað fólki til at velja í góðari tíð fyri at tryggja sær, at atkvøðurnar verða taldar við. Ongum nýtist at sita við hús, tí tað er langt til valstaðið, tí allastaðni hava flokkarnir fingið sær fólk, sum sita klár til at koyra fólk á val.

## Aftur í hægstarætt?

Í gjár vístu tær seinastu veljarakanningarnar, at munurin á Bush og Kerry er so lítil, at tað ber als ikki til at siga, hvør fer at vinna. Summar kanningar søgdu, at tað stendur á jøvnum 50-50, onkur kanning gav Bush eitt prosentstig meiri, og onkur onnur kanning gav Kerry tvey prosentstig meiri.

Tað avgerandi í kanningunum var, at tað stendur so at siga á jøvnum í minst seks av teimum sokallaðu ivastatunum. Tað eru statir, har úrslitið kann fara báðar vegir. Tað var tí ikki so løgið at Bush og Kerry vóru í Florida og Ohio sunnudagin, tí har er púra javnt.

Nógvir amerikanskir eygleiðarar siga, at tað kann enda sum seinast, t.v.s. at annað valevni fær fleiri atkvøður, men at hitt vinnur valið. Tí hava báðir flokkarnir brynjað seg út við fleiri túsund sakførarum, hvørs uppgáva verður at finna mistøk og villur, ið kunnu kolldøma úrslitið. Og so endar alt kanska aftur í hægstarætti sum seinast.



# Hóttanir um uppsagnir í tíð og ótíð

**Løgtingsmaður Sjálvstýrisfloksins, Kári P. Højgaard, sigur, at er ætlanin at avtaka Postverk Føroya sum tænastuveitara á høgum støði við útlisiteringum til eitt nú bensinsølur og bygdahandlar, fer Sjálvstýrisflokkurin ikki at taka undir við lógaruppskotinum**

POSTVERK FØROYA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*– Sjálvstýrisflokkurin vil hava trygd fyri, at Postverk Føroya í framtíðini verður ein samanhangandi eind sum víðkar um inntøkumøguleikarnar við bretaðum útboðum og tænastum, samstundis sum neyðugar sparingar, rationaliseringar og effektiviseringar betra kappingarstøðuna, sigur Kári P. Højgaard, løgtingsmaður*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum, Kári P. Højgaard, sum eisini hevur verið postmaður í mong ár, heldur ikki nógv um úttalilsini hjá landsstýrismanninum, Bjarna Djurholm og stjóranum á Postverki Føroya, Bergi í Garði, sum herfyri gjørdu viðmerkingar í Sosialinum um ætlaninar at skipa Postverk Føroya sum alment partafelag.

Á fíggjarlógini í ár standa 30 miljónir krónur, sum ætlanin er at nýta til eginpening í almenna partafelagnum.

Kári sigur, at seinasta samgonga var komin undir land við ætlanunum at einskilja Postverk Føroya, og í hesum sambandi vóru Fólkaflokkurin, Tjóðveldisflokkurin, Miðflokkurin og Sjálvsstýrisflokkurin við í einum fylgibólki, sum hevði til endamáls at skapa karmar um eitt dynamiskt, effektiviserað og rationaliserað Postverk Føroya.

– Alt var komið upp á pláss, og bæði samgongufloksarnir og Postfelagið høvdu sagt gott fyri uppskotinum. Tað einasta, sum endaliga skuldi fáast upp á pláss, vóru starvsfólkarættindini, men landsstýrismaðurin, Bjarni Djurholm og Anfinn Kalsberg, táverandi løgmaður, góvu trygd fyri hesum.

## Kári skelkaður

Kári sigur, at uppskotið var klárt at bera í løgtingið, tá samgongan kollsigldi.

– Eg hevði væntað, at friður nú valdaði um hetta mál, og at tað fór at verða samtykt einmælt. Men satt at siga fekk eg ein skelk, tá ið las Sosialin, 28. oktober. Í hesum blaðnum eru tríggjar greinar við myndum, ið snúgva seg um ætlaninar. Tann eina greinin er samrøða við landsstýrismannin, Bjarna Djurholm, har hesin hugsunarsamur – á myndini – sigur positivt, at »Hetta er fyrsta stigið móti menning…«. Á somu síðu eru tvær aðrar greinar, har postverksstjórin sigur, at »Posthúsið í SMS verður stongt« – og síðan kemur hann við ársins tíðindum, sum Kári tekur til, nevniliga, »Postavgreiðsla á bensinstøðini«.

Kári sigur seg undrast yvir, hví postverkstjórin kemur við hesum útsagnum.

– Hví skal leiðslan á hesum stovni almannakunngerða uppsagnir í tíð og ótíð. Eru felag og leiðslan kunnað, kundi eg hugsað mær at vitað, hví afturvendandi hóttanir um uppsagnir javnan skulu berast fram í fjølmiðlunum.

Løgtingsmaður Sjálvstýrisfloksins vísir á, at einki starvsfólk kann í longdini liva við hóttanum av hesum slagi, tí hetta drepur bæði arbeiðshug og tryggleika. Aftrat hesum missa viðskiftafólkini álitið á stovnin og fara at hyggja aðrar vegir.

– Tá ið eitt felag ella ein handil koyrir tungt, er ikki vanligt at almannakunngerða, hvussu vánalig støðan er, men vanligt er at bíða, til seymurin verður negldur í hurðina, sigur Kári P. Højgaard.

## Fullkomiliga óveruligt

Hann sigur, at tað kennist fullkomiliga óveruligt, tá ið leiðslan á postverkinum boðar frá, at tað fer at bera til at leggja partar av postavgreiðsluvirkseminum á bensinstøðir ella bygdahandlar, tá ið nýggja partafelagið er farið til verka.

– At Alfred Olsen, løgtingsmaður, í bløðunum eisini hevur sagt seg taka undir við hesum, hevði eg ikki væntað, sigur Kári.

Hann sigur, at Sjálvstýrisflokkurin vil hava trygd fyri, at Postverk Føroya í framtíðini verður ein samanhangandi eind sum víðkar um inntøkumøguleikarnar við bretaðum útboðum og tænastum, samstundis sum neyðugar sparingar, rationaliseringar og effektiviseringar betra kappingarstøðuna.

– Verða uppgávur og tænastur uttanfyri handilsligar fyritreytir, álagdar stovninum, er neyðugt, at tilsvarandi peningaupphæddir fylgja almennu krøvunum.

Løgtingsmaður Sjálvstýrisfloksins sigur, at er ætlanin at avtaka Postverk Føroya sum tænastuveitara á høgum støði við teimum ætlaðu útlisiteringunum, ið nevndar eru í greinunum í Sosialinum, fer Sjálvstýrisflokkurin ikki at taka undir við lógaruppskotinum.




# Við kenning og ongum koyrikorti

FERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinasta fríggjadag tók løgreglan í Eysturoy ein bilførara, sum koyrdi við kenning og við ongum koyrikorti.

Bilførarin varð ikki tikin undir skipaðum kanningum hjá løgregluni, men løgreglan varnaðist, at alt ikki var, sum tað átti.

– Tað vísti seg, at bilførarin bæði hevði kenning og koyrdi við ongum koyrikortið, sigur sýslumaðurin í Eysturoy, Kristian Martin Joensen.

Hann sigur annars, at friðarligt var í Eysturoy farna vikuskifti, bæði úti og heima.

– Vit fingu fráboðan um onkra minni buglu, sum altíð hendir av og á, men einki av nøkrum serligum týdningi, sigur Kristian Martin Joensen.

# 12 bilar og eingin frágreiðing

FERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mikukvøldið, 27. okt., kannaði løgreglan í Eysturoy 12 bilar í Skálafirði.

Sýslumaðurin í Eysturoy, Kristian Martin Joensen, sigur, at allir bilarnir vóru í góðum standi – og tað vóru bilførararnir eisini.

– Hetta kvøldið var eingin frágreiðing skrivað, sigur sýslumaðurin.

Jólapostur 2004

Jólapostur til grannalondini eigur at vera á posthúsinum í Tórshavn ikki seinni enn:

| | Flogpostur Brøv | Flogpostur pakkar | Skipspostur Brøv | Skipspostur Pakkar |
|---|---|---|---|---|
| Bretland | 16.12 | 15.12 | 02.12 | 02.12 |
| Danmørk | 20.12 | 16.12 | 09.12 | 09.12 |
| Finnland | 17.12 | 17.12 | 09.12 | 09.12 |
| Grønland, Nuuk | 16.12 | 16.12 | 25.11 | 25.11 |
| Ísland | 16.12 | 16.12 | senda ikki vi | skipi |
| Noreg | 17.12 | 13.12 | 09.12 | 09.12 |
| Svøríki | 17.12 | 17.12 | 09.12 | 09.12 |

Freistirnar eru eisini at síggja á www.postur.fo
Uppl singar um seinastu freistir til onnur lond og nærri uppl singar um freistirnar til a rar b ir í Grønlandi eru at fáa á størstu posthúsunum

Innanlands
Jólapostur til móttakarar í Føroyum eigur at vera latin inn í seinasta lagi t sdagin 21. desember

Tollgrei sla
Ta er sera umrá andi fyri skjóta tollgrei slu í móttakaralondunum, at vøruinnihaldi (gávurnar) í sendingunum ver ur skrivliga útgreina á tollsøgnina

Matvøra
Avmarkingar eru tá matvøra skal sendast til útheimin. Uppl singar eru at fáa á posthúsinum, um hvat og hvussu nógv kann sendast í hvørjum pakka

Tilskriftarleysar sendingar í desember
Tilskriftarleysar sendingar kunnu sendast uttan eykakostna . Gjøldini og vanligu reglurnar eru at finna á www.postur.fo

Ve ri kann darva postflutningin
Sendi tí postin í gó ari tí
Postverk Føroya